## DAGSINS MEINING

# Viðkomandi uppgerð við einaræði

Sum øllum kunnugt varð einaræðisharrin Pinochet tvungin at lata valdið frá sær eftir nógv ár í Chile við blóðugum harðræði. Pinochet lat ikki valdið frá sær uttan víðari, og neyðugt var at gera nógvar ótespiligar neyðsemjur, til tess at fáa einaræðisharran og hervald hansara at góðtaka eina fólkaræðisliga samfelagsskipan í Chile. Ein partur av neyðsemjunum var, at heryvirmenn skuldu ikki verða revsaðir fyri brotsverk, ið vóru framd móti viðhaldsfólki Allendes.

Hetta kendist sjálvsagt sárt hjá avvarandi at teimum mongu, eitt nú sangarin og tónasmiðurin Victor Jara, sum opinlýst vórðu tikin av døgum uttan lóg og dóm, ella sum hvurvu í Nacht und Nebel. Eingin uttan brotsmenninir vistu, hvat ið var hent við øllum teimum horvnu. Óvissan var tung at bera hjá teimum mongu avvarandi. Einaræðisharrin, ið ber høvuðsábyrgdina av allari hesari neyð og øllum hesum ræðuleikum, livir og letur sum honum lystir í størsta marglæti fyri skattaborgarans pening! Hetta kenst hjá mongum órættvíst, milt talað. Tað er jú ongantíð hent, at brotsmenninir eins og gjørt varð í t.d. Suðurafrika fingu høvi at angra og at greiða almenninginum frá sínum brotsverkum. Ein slík loysn hevði reinsað luftina og tryggjað teimum avvarandi upplýsingar um tey horvnu. Ein slík loysn hevði eisini gjørt, at teir verstu brotsmenninir vórðu revsaðir. Tí eru krøvini nú harðnað um, at gjørt verður upp við brotsmenninar, soleiðis at alt frá Pinochettíðini, sum enn er dult, kemur í ljósmála. Tað er í hesum sambandi løgið at hugsa sær, at harðræðið hjá Pinochet fekk undirtøku frá politiskum flokki, sum í dag situr við miklum valdi í Føroyum.

Í Argentina hendi sami sorgarleikur sum í Chile. Men har hava politisku flokkarnir nú gjørt av, at gerast skal upp við politisku brotsmenninar einaferð med alla. Farið verður nú í hernað móti teimum herovastum, sum bera høvuðsábyrgdina av øllum ræðuleikunum, ið vórðu framdir móti demokratiskt hugsandi fólki í landinum. Teir koma nú fyri rættin. Greiða skal fáast á tí, sum hendi við øllum, sum hvurvu, meðan hervaldið hevði ræðið. Fólk um allan heim bíða spent eftir uppgerðunum í báðum londum, tí hesi viðurskifti viðkoma ikki bert chilenum og argentinum, men øllum demokratiskt sinnaðum menniskjum uttan mun til, hvar á Jørðini, tey nu einaferð eru stødd.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Gev fólkinum sjónleik...

**Jóannes Eidesgaard**



Líkt er til, at samgongan tekur táttin uppaftur, har hon slepti, tá tingárið endaði. Gev fólkinum sjónleik, so gloyma tey – væl stuðlaði av fjølmiðlunum – teir dagligu gráu trupulleikarnir. Og andstøðan fær ikki eitt orð innført, tí sjónleikurin í samgonguni er munandi betur undirhald.

Ein blaðmaður hjá Dimmalætting ringdi fyri nøkrum døgum síðani og spurdi, hvørji mál, eg roknaði við fóru at verða stóru stríðsmálini í politiska árinum, sum byrjaði á ólavsøku. Eg svaraði, at tá tað snúði seg um verulig politisk mál í løgtinginum, so fóru tað at verða serliga tvey mál, sum fóru at geva stríð millum ymisku partarnar, og tað vóru fíggjarlógin fyri 2004 og fráboðaðu privatiseringarnar. Men so legði eg aftrat, at tá tað kom til stríðsmál annars, so fór samgongan sjálv at taka sær av tí, og hon hevði so avgjørt ikki brúk fyri hjálp frá andstøðuni til tað.

Og sum frálíður eri eg komin alt meira eftir, at alt hetta er ein sjónleikur, sum verður stjórnaður frá stjórnarskrivstovunum í Tinganesi. Ein sjónleikur, sum hevur sum mál, at fjølmiðlarnir verða stýrdir til bert at fáast við tað, sum leiðslan í samgonguni ynskir, at fjølmiðlarnir skulu fáast við. So til tess at fjølmiðlar, andstøða og fólk annars ikki seta fokus á veruligar trupulleikarnar í okkara samfelag og til tess at tiga andstøðuna í hel, so gjarar man út við ymiskum innanhýsis stríðsmálum, sum serliga Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru so rúkandi ósamdir um. Og útgjaringin er so mikið góð, at øll bíta á og halda, at hetta er veruligi politikkur, tað snýr seg um.

Skiftivís hoyra vit Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin skjóta eftir hvørjum øðrum í fjølmiðlunum, men hetta er sjónleikurin, tí málið er ikki ósemjan, men tað at teir eiga yvirskriftirnar og fáa markera síni sjónarmið, og so ikki at gloyma, at andstøðan verðu tagd burtur. Stutt sagt: ein sjónleikur fyri at varðveita maktina.

**Lat okkum taka nøkur dømi:**

– Málið um Jógvan S er so eitt fólkafloksteatur alt sum tað er. Fólkaflokkurin gevur tilsøgnina um fiskiloyvi dagin fyri løgtingsvalið – Fólkaflokkurin útskrivar fyribils fiskiloyvi næstan dagin fyri, at landsstýrismálanevndin kemur við sínari niðurstøðu – og Fólkaflokkurin tekur fiskiloyvið aftur. Reiðarin, sum hevur sitið á tingi fyri Fólkaflokkin kann nú leggja sak og siga, hvussu nógv endurgjald, hann skal hava. Fólkaflokkurin hevur frammanundan við almennum pengum syrgt fyri, at advokatar geva reiðarínum rætt og landsstýrismálanevndini órætt, so ta sakina skal reiðarin vinna. Og omaná alt, so sigur reiðarin, at hann er politiskt forfylgdur. (Er tað veruliga so, sum reiðarin sigur, so er talan um politiska kannibalismu, tí Fólkaflokkurin eigur málið, alt sum tað er, og hevur sitið báðumegin borðið frá byrjan til enda. Fólkaflokkurin hevur bæði givið og fingið) Fyri ikki at órógva henda sjónleik, so sleppur Tjóðveldisflokkurin at eiga leiklutin sum tann einasti flokkur, sum heldur, at slíkt kann ikki bera til, og tí má fiskiloyvið takast aftur. At vit onnur høvdu somu áskoðan var als ikki áhugavert.

– Annita á Fríðriksmørk sigur í umrøðuni av løgmansrøðuni, at hon heldur, at tíðin nú er komin til at taka sjómanfrádrátturin upp á 15% av. Hetta gevur so restini av Tjóðveldisflokkinum og serliga Karsteni Hansen og Rúna Hentze høvið til at markera teirra støðu, eins og Fólkaflokkurin sleppur at sláa manngarð um frádráttin. Hvat andstøðan sigur um sama mál, verður ikki tikið upp á tungu.

– Karsten Hansen og Heini O. Heinesen seta spurningar við handfaringina hjá Bjarna Djurholm av málinum um fasta sambandið um Lorvíksfjørð. Hetta gevur síðan báðum pørtum høvið til at markera yvir fyri norðoyingum, at tað serliga eru hesir báðir flokkar, sum brenna fyri sakini, og eingin tímir at spyrja andstøðuna, hvat hon heldur.

– Høgni Hoydal og lutvíst Hergeir Nielsen seta fram ynski um eitt samferðslugjald, soleiðis at tað gerst ókeypis at ferðast til útoyggj og munandi bíligari til útjaðaran. Høgni Hoydal sleppur framat í bestu senditíð í bæði útvarpi og sjónvarpi at marknaðarføra handritið. Hann og Tjóðveldisflokkurin standa nú sum teir einastu, sum vilja útjaðaranum nakað munagott. Men samstundis gevur hetta eisini Fólkaflokkinum og serliga Bjarna Djurholm, sum alt meira tykist vera veruligi leiðarin í Fólkaflokkinum, høvið til at markera, at teir als ikki kunnu góðtaka hækkaði avgjøld ella hækkaðir skattir. Báðir flokkar sleppa at markera teirra hugsjónir, men hvat andstøðan heldur um hetta mál, nei tað er ikki áhugavert.

Her vóru so fýra dømi bara síðan á ólavsøku. Dagsskráin er ivaleyst longu sett, og handritini liggja uttan iva klár til fleiri sjónleikir, sum vit skulu undirhaldast við, nú náturnar leingjast og dagarnir styttast.

Eitt mugu vit so viðurkenna í andstøðuni, og tað er, at vit eru sera vánalig, tá tað kemur til at seta sjónleikir upp. Men tað var nú heldur ikki tað, vit roknaðu við, at politikkur skuldi snúgva seg um.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Oyggjarsamfelagið og kostnaðurin

**Hergeir Nielsen**



Teir í fólkaflokkinum eru á gosið, tí vit í tjóðveldisflokkinum arbeiða við nøkrum av avtalunum í samgonguskjalinum.

Avtalurnar siga ma. at,
– ætlan verður løgd fyri, hvussu tilmælini um økismenning og útoyggjapolitikk kunnu verða fylgd,
– at flutningskostnaður skal sum minst darvað kappingarførinum hjá vinnulívinum í útjaðaranum,
– at miðast skal ímóti, at allir borgarar landsins fáa nøktandi tænastustig innan vinnu, telesamskifti, samferðslu, heilsu-, almanna-, menta- og skúlamál.

Hesar avtalur eru púra greiðar, og elva til eina umlegging av fleiri viðurskiftum á samferðsluøkinum, skulu tær haldast.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum umsitur samferðsluøkið. Hann hevur, sum skilst, tíverri lítið og einki gjørt við hesi mál, og hevur ongar ætlanir og einki uppskot um, hvussu hesi kunnu skipast.

Harafturat hoyra vit hann siga seg heldur vilja liggja lík, skulu okkara hugskot og avtalur fremjast.

Hetta er greið tala, og kann ikki skiljast øðrvísi enn, at fólkaflokkurin ikki sær seg føran fyri at halda samgonguskjalið, hvat avtalunum um økismenning viðvíkur.

Flokkurin hevur í nýtum orðum í hálva øld funnist at rakstrarkostnaðinum av SL. Síðani hann kom at umsita málið, er hesin kostnaður øktur úr 126 upp í 163 mió.kr., ella við næstan 30%.

Bara lønarparturin er pumpaður úr 50 mió.kr. upp í 66 mió.kr.

Tað er ein sorgarsøga í sjálvum sær, at fólkaflokkurin skal sita á einum stórum parti av teimum málum, ið viðvíkja útjaðaranum, um flokkurin er karvandi líka glaður við, um naka lív er lagað fólki har ella ikki.

Vit, sum politiskt hava tryggjað okkum, at nakað skal henda við økismenningini, eru fullgreið yvir, at hetta eisini treytar eina umskipan av teimum byrðum, ið liggja á samferðsluøkinum.

Samstundis sum økismenningin verður tosað í hel, streymar fólkið til miðstaðarøkið, og vit, sum royna at koma við uppskotum um batar, verða hóttir við alskyns ólukkum.

Men rætt skal vera rætt. Undir viðgerðini av løgmansrøðuni var positiv undirtøku frá einum fólkafloksmanni um at flyta umsitingina av Smyril nærri brúkaranum, og tað er at fegnast um.

Vónandi fer tað ikki at taka lívið av landsstýrismanninum, um vit flyta hesa umsiting til Suðuroyar. Eitt hóskandi stig er at gera tað, tá nýggi Smyril kemur.

Samferðslugjaldið hevur fyrr verið umrøtt í samgonguni, og nú sær tað út til rættiliga at níva teir í fólkaflokkinum.

Heðin Zachariasen sigur seg hava fingið ein skelk, og at tað er óhugsandi, at tey sum ikki brúka SL, rinda meiri kostnað av hesum.

Vit koyra út har landfast er, siga handilsmenn í lýsingum sínum, og tað sama siga fólkafloksmenn.

Streymnesmaðurin koyrir har landfast er. Hann sleppur altíð eftir fjøllunum til Havnar, og er tað ikki nóg gott, so hava vit sprongt honum ein veg gjøgnum fjøllini uttan at taka eina krónu frá honum í gjaldi fyri at brúka landsvegirnar.

Takkarlønin frá honum er, at útjaðarin í oyggjasamfelagnum Føroyar skal sigla sín salta sjógv, bundin at líkindum, ferðaætlanum og kostnaði pr. túr fyri at brúka sjóvegis landsvegirnar.

So langt liggja vit frá hvørjum øðrum, og so vita vit tað.

Fólkaflokkurin illneitast inn á okkum, tí vit viðgera týdningaramikil mál á samferðsluøkinum, men ta ábreiðsluna leggja vit ikki so nógv í, so leingi sum vit síggja, at tað ger mun og er til samfelagsins besta.

Tað er nýtt og pátikið, at landsstýrismaðurin fær líkdæmi og er ímóti hægri gjøldum. Tvørturímóti, so yndar hann at leggja hægri gjøld á almenna flutningin.

Vit støðgaðu honum í vár í at fremja eina størri hækking av samferðslugjøldunum, og áløgdu honum í størri mun at fíggja hallið hjá SL við rationaliseringum heldur enn við hækkaðum ferðaseðlagjøldum

Støðgaðu vit ikki landsstýrismanninum, høvdu koyggjuprísirnir á Smyrli verið 300 kr. afturat ferðaseðlagjaldinum.

Støðgaðu vit ikki landsstýrismanninum, fingu vit ein Smyril triðing minni enn tann komandi fyri sama rakstrarkostnað.

Støðgaðu vit ikki landsstýrismanninum, kom hann niðan í tingi við eini fjallasmogu undir Hovstúgvu fyri 140 mió.kr., ella fyri triðings meirkostnað omanfyri Øravíkar Hov bergholið.

Støðgaðu vit ikki landsstýrismanninum, hevði hann lopið varandi ólag á partarnir á arbeiðsmarknaðinum við handfaringini av uppskotinum um ein møguligan arbeiðsrætt.

Og so frameftir, og so frameftir

Ikki er fólkafloksmonnum neyðugt at liggja í svøvnloysi, tí at ein samstarvsflokkur hugsar og virkar positivt eftir gjørdum avtalum til samfelagsins besta.

Vit hava ikki ætlað okkum at taka nakað úr hondum teirra, men teir eiga at geva okkum eins góðan rætt til at viðgera teirra mál, sum teir taka sær at viðgera okkara.

# 12. Maður hitar upp í Club 20

LANDSDYSTUR
*Tíðindaskriv*

12. Maður skipar fyri upphiting til dystin Føroyar-Ísland á Tórsvølli mikudagin.

Á skránni er ókeypis andlitsmáling, felagssangur, tipping o.a.

Eisini verður søla av fløggum, turrukløðum, húgvum, blusum o.ø.

Nógv góð tilboð til limirnar. Havi limakortið við.

12. Maður bjóðar ókeypis øl & sodavatn til limirnar.

Nýggir limir kunnu tekna seg.

Byrja verður kl. 15.00.

Kl. 18.15 verður skrúðgonga niðan á Tórsvøll.

Øll eru vælkomin.




# Seinasta rentulækkingin í USA hesuferð

Farna vika gjørdist eitt framhald av gongdini í seinastuni og enn ein staðfesting av, at tað sum heild gongur framá í USA. Seinastu prísvakstraruppgerðirnar hava fyribils burturbeint óttan um ein fallandi prísvøkstur, og saman við positivu búskapargongdini hevur hetta gjørt, at mett verður ikki longur, at rentan skal lækkast meira í USA á hesum sinni. Ein onnur orsøk til hetta er, at tað sýnist, sum um nýtsluhugurin hjá amerikanska brúkaranum aftur er um at økjast, og hetta er sera gott fyri búskapin.

Streymslit í USA í farnu viku gjørdi, at positivar búskaparligar uppgerðir og eitt nú ein góður roknskapur frá teldufyritøkuni Dell, ikki fingu ta ávirkan á marknaðirnar, sum rætt hevði verið. Hóast talan ikki var um yvirgang, undirstrikar hendingin, at amerikumenn dagliga liva í óttanum fyri yvirgangi, og at slíkar hendingar kunnu skapa sveiggj á virkisbrævamarknaðunum.

Lánsbrævarenturnar eru sum heild hækkaðar í farnu viku. Orsøkin er serliga bjørt amerikonsk lyklatøl. Hóast lutfalsliga fáar búskaparligar uppgerðir verða almannakunngjørdar hesa vikuna, verður framhaldandi mett, at rentan á longum lánsbrøvum kann vera óstøðug. Renturnar eru hækkaðar nógv í seinastuni og roknast kann tí allatíðina við einari mótrørðslu. Kortini skal fyribils ikki roknast einari veruligari broyting í rentustiginum. Við øðrum orðum kann væntast, at renturnar fara at sveiggja í einum føstum talstrekki í næstum.

Danska partafelagið A.P. Møller – Mærsk A/S stóð seg sera væl í farnu viku og hækkaði 6,8%. Hóast talan er um eitt sterkt og væl rikið virki og at kappingarneytar hava kunngjørt góðar roknskapir, er vandi fyri, at bjartskygnið er ov stórt um roknskapin hjá A.P. Møller. Partabrøvini kunnu tí fella bæði orsakað av vinningsstaðfesting og tá roknskapurin verður kunngjørdur tann 26. august.

Partabrøv hava sum heild staðið seg sera væl í seinastuni, samstundis sum lánsbrævarenturnar eru hækkaðar. Lánsbrøv eru tí vorðin áhugaverd at keypa og hetta kann seta partabrøvini undir trýst. Roknast kann tí við døgum við falli. Kortini vísa virkir framhaldandi á góðar roknskapir og millum annað hetta stýrkir trúnna um, at partabrøv kunnu liggja hægri við ársenda.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | ⇨ |
| 2 ára lánsbræv | 2,94% | 0,11% | ⇧ |
| 5 ára lánsbræv | 3,74% | 0,19% | ⇧ |
| 10 ára lánsbræv | 4,41% | 0,13% | ⇧ |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 233,0 | 4,3% | ⇧ |
| OMX, Svøriki | 578,0 | 3,6% | ⇧ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.510,2 | 2,9% | ⇧ |
| S&P 500, USA | 990,7 | 1,0% | ⇧ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,26 | -0,3% | ⇩ |
| Evru Lánsbrøv | 164,19 | -0,9% | ⇩ |
| Norron Partabrøv | 66,40 | 2,8% | ⇧ |
| Altjóða Partabrøv | 70,95 | 0,5% | ⇧ |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 661,88 | 1,2% | ⇧ |
| EUR | 743,27 | 0,0% | ⇨ |
| GBP | 1.055,90 | 0,4% | ⇧ |
| NOK | 89,42 | -0,9% | ⇩ |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*